# Jólabræv frá Málnevndini

**Føroysk tala og teksting í SVF**
Týðing er alt meira vorðið eitt fyribrigdi, sum vit møta allastaðni, og sum setur dám á dagin. Tak loftmiðlarnar, sum hvønn dag bera tíðindi úr útheiminum; teir fáa tey frá útlendskum tíðindastovum og týða og umskriva tey skundisliga til føroyskt. Oftast hugsa vit ikki um, at tað er týðing, vit lurta eftir í uttanlandstíðindunum, at teksturin er farin gjøgnum eina umskapan og er blivin til ein nýggjan, føroyskan tekst. Tann støðugi streymurin av uttanlandstíðindum, týddum til føroyskt, ger útheimin til ein part av føroyska málheiminum.

Tey týddu og umskrivaðu uttanlandstíðindini knýta javnt og samt partar av útheiminum at føroyska málheiminum.

Men tá ið um tann sterkasta miðilin, sjónvarpið, ræður – í hesum føri SVF - so er eitt stórt men, hvat viðvíkur týðingarvirksemi: flestar útlendskar sendingar verða ikki týddar, hvørki við talu ella teksti. Danskar sendingar verða sendar ótekstaðar og aðrar sendar við donskum teksti. Tú hoyrir ofta fólk siga, at tey lesa ikki danska tekstin á ensku sendingunum, tey skilja enskt og lurta bara eftir taluni. Granskarar siga tó, at hóast hyggjarin skilur taluna í einum filmi, lesur hann eisini tekstin undir myndini, um hann er á einum máli, hyggjarin hevur hilling á ella áhuga fyri . Tað er eyðvitað góð venjing og styrkir málkunnleikan, tí hyggjarin situr alla tíðina og ber saman tekstin undir myndunum og taluna í filminum. Vanlukkan er bara, at hjá okkum er tað venjing í donskum og enskum, meðan føroyskt verður við sviðusoð. Hvussu aktivt fólk taka ímóti teksti til talu - meira ella minni tilvitað - síggja vit, tá ið tað hendingaferð eru føroyskir tekstir. Tá verður dúgliga tosað um týðingina: um hon er góð, beinrakin, snøgg ella ikki; ofta verður funnist at, og hyggjarin hevur nógv betri uppskot til, hvussu okkurt orð átti at verið týtt, og gloymt verður, at sjónvarpstýðarin er bundin av, at teksturin má ikki fylla meira enn eitt vist, at stundir ikki eru til at bøla oman á hvørjum einstøkum orði, umframt tað, at tað er lættari at sita heima í sofuni og finnast at einstøkum orðum, tá ið ein týðari longu hevur gjørt eina føroyska versjón av tekstheildini, sum tað so ber til at finnast at.

Føroyskur tekstur á øllum útlendskum sendingum í SVF hevði verið ómetaliga stimbrandi fyri snøggan og liðiligan málburð á øllum økjum og hjá øllum bólkum.

Føroysk tala í SVF og føroyskur tekstur, tá ið talan ikki er á føroyskum, er tað einstaka átakið, sum hevði munað mest í starvinum fyri, at føroyskt mál skal halda pláss í dagsins og morgindagsins samfelagi.

**Vísindi**
*Vísindi* er fleirtalsorð. Dømi um fleirtalsorðið vísindi: *Málvísindi í 19. øld løgdu dent á upprunan hjá málunum. Málvísindini funnu tá fram til skyldskapin millum øll tey indoevropisku málini. Í 20. øld løgdu málvísindini á annan bógv og fóru at rannsaka mál sum bygnað ella struktur av tilvildarligum teknum, har sínámillum sambandið millum teknini var altumráðandi. Í 21. øld standa norðurlendsk málvísindi framman fyri nýggjum avbjóðingum.*

Eitt annað fleirtalsorð av sama slag er orðið tíðindi: *Hesi vóru tíðindini.*

*Tíðindi siga, at vísindini vinna flestar vansar.*

**Í sambandi við**
Tað er ikki sjáldsamt at síggja og hoyra setningar sum: *Tíðindafundur varð hildin í samband við tiltakið. Skipað varð fyri trygdartiltøkum í samband við fundin.* Í hesum føri stýrir til hvørjumfalli, so tað rætta er at siga: *Tíðindafundur varð hildin í sambandi við tiltakið. Skipað varð fyri trygdartiltøkum í sambandi við fundin.* At tað er hvørjumfall sæst m.a. av, at vit kunnu spyrja: Í hvørjum sambandi varð tíðindafundur hildin? *Í hvørjum sambandi varð skipað fyri trygdartiltøkum.*

**Sandagerði**
Navnorðið gerði er hvørkikynsorð og bendist sum *kvæði*. Tað eitur sostatt *gerði* í hvør- og hvønnfalli eintali umframt í hvørjumfalli. Tað er tí ikki rætt at siga eitt nú *Sandagerð er tætt við* ella *út í Sandagerð*. Tað eigur at vera Sandagerði er tætt við og út í Sandagerði. Tað er ongantíð rætt at siga Sandagerð.

**Hesa ferð**
Tað er rættiliga vanligt at skriva, og kanska eisini siga, *hesu ferð* ella *hesuferð*, men fornavnið *hesin* eitur *hesa* í hvønnfalli kvennkyni, og *ferð* er kvennkynsorð. Vit siga t.d. *Eg sá hesa gentuna* og *Tað var hesa gentuna, eg sá.* Somuleiðis skuldu vit sagt *Tað var hesa ferð* ella *hesa ferðina.* Mælt verður til at skriva hesa ferð í tveimum, tí tað eru tvey orð.

**Hoyringarskriv**
*Hoyring* er kvennkynsorð, og kvennkynsorð enda ikki við *-s* í hvørsfalli. Tað hevði tí verið rættari at sagt *hoyringarskriv* enn *hoyringsskriv*.

**Tollaksmessa**
23. desember eitur *tollaksmessa* ella *tollaksmessudagur*; í Jákupi á Møn stendur

Meya átti henda son
tollaksmessudag,
meira legði hon røkt á hann
enn alt sítt gull og fæ.

22. desember er *tollaksmessuaftan*.

**Gleðilig jól og eydnuríkt nýggjár!**

# Nýggjur heilsuverksstjóri óneyðugur

BJØRN KALSØ
løgtingsmaður

**Tað er burturvið við einari nýggjari yvirskipaðari leiðslu á sjúkrahús- og heilsuøkinum. Peningurin eigur at nýtast til at geva borgarunum í landinum eina góða tænastu, ikki til fleiri leiðsluløg at umsita øki, sum aðrar leiðslur longu frammanundan hava ábyrgdina av. Hetta hava vit als ikki ráð til. Skulu broytingar gerast, má talan heldur vera um færri leiðsluløg við greiðari ábyrgdarbýti.**

Gjørdist ikki sørt skakkur, tá tað í heilsíðulýsing herfyri varð søkt eftir nýggjum heilsuverksstjóra, sum m.a. skal hava yvirskipaðu leiðsluna á øllum trimum sjúkrahúsunum í landinum.

**Tungur leiðslubygnaður**
Á sjúkrahús- og heilsuøkinum hava vit ein tungan leiðslubygnað sum er. Leiðsluløgini eru fleiri í tali. Landsstýrismaðurin er ovasti umsitingarligi leiðarin. Undir sær hevur hann aðalstjóra umframt fleiri leiðandi umsitarar og deildarleiðarar í Heilsumálaráðnum. Á Landssjúkrahúsinum er trístreingja leiðsla, trístreingjaðar leiðslur eru á Klaksvíkar- og Suðuroyar Sjúkrahúsi, umframt leiðandi yvirlæknar, leiðandi y virsjúkrarøktarfrøðingar, yvirlæknar, yvirsjúkrarøkta rfrøðingar og onnur leiðandi starvsfólk á ymiskum økjum og tænastum.

Allar hesar leiðslur hava sum er skyldu til at samstarva, fyri at gagnnýta kapasitetin á øllum trimum sjúkrahúsunum so væl sum gjørligt. Somuleiðis hava verandi leiðslur skyldu til at halda seg til neyva figgjarstýring.

Tað undrar tí, at nakar kann kenna tørv á at seta fleiri leiðsluløg. Virkar verandi bygnaður ikki nóg væl, mugu stig takast øvutan veg. Neyðugt er við rationaliseringum, t.d. við at taka burtur leiðsluløg og nágreina ábyrgdarøkið.

**Peningurin nýtast til sjúklingin**
Á sjúkrahús- og heilsuøkinum er umráðandi, at sjúklingurin/borgarin fær eina góða tænastu. Tí eigur peningurin at nýtast til tann partin! Ikki til eitt leiðslulag afturat, sum í grundini skal umsita ábyrgdarøki, sum aðrar leiðslur longu framanundan eiga ábyrgdina av.




Ein góð jólagáva

Nú kanst tú geva allar fýra fløgurnar frá Stanley í jólagávu fyri bara 400 kr. Tú sparir 276 kr. Vanligur útsøluprísur er 169 kr. fyri hvørja. Tilboðið er bert galdandi inntil jóla. Avmarkað nøgd. Fløgupakkarnir fáast í sølubúðum kring landið.

Gleðilig jól

Stanley Samuelsen